# Merkisdagar



## Gullbrúdleyp

Fríggjadagin 27. mai hava vit Dora Várlíð og Eivind Fróði Jacobsen, Sørvágur, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í missiónshúsinum í Sørvági kl: 19:00. Tey ið ynskja at gleðast saman við okkum henda dagin, verða vinarliga biðin um at siga frá innan sunnudagin 15. mai á tlf 33 21 33 ella 28 63 69.

## Gullbrúdleyp

Týsdagin 10. mai er gullbrúðleypsdagur hjá Jónu og Jákup Lindenskov. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum frá klokkan 17.30, og øll eru hjartaliga vælkomin.

## Silvurbrúdleyp

3. mai kunnu Birna og Hans Pauli Larsen á Oyrabakka halda silvurbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

## Brúdleyp

Leygardagin 7. mai kl. 13 giftast í Vestmanna Kirkju, Jeannet J. Mouritsen, Sørvágur og Klæmint Joensen, Vestmanna. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 18. Brúðarhús verður á Traðarvegi 19 í Sørvági sunnudagin 8. mai frá kl. 17:00 Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Brúdleyp

Leygardagin 11.juni 2011 giftast Malan Ludvig, Tórshavn og Dávur Brøðraberg, Tórshavn. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 11, og nátturði verður í Sjóndeplinum í Tórshavn frá kl. 19. Tey, ið ynskja at hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 251008 (Malan) ella á tlf. 215060 (Dávur) innan 15.mai 2011.

**HUFF**
Hundaeigarafelag Føroya limur í Dansk Kennelklub, kreds 12. Tlf. 277317. Til ber at tekna seg sum lim og spyrja um eitthvørt viðv. hundum. Hvørt týskvøld kl. 19 ganga vit túr, møtast við Skógrøkt Landsins.

**Frítíðarfelagið »Antares«**
Postsmoga 11, 490 Strendur.
Frítíðarfelag hvørs endamál er at røkja áhugamál hjá teimum føroyingum ið starvast í altjóða farma- og frálandavinnu. Meira fæst at vita við at venda sær til Felagið á tlf. 590100, ella um teldupost aldebaran@kallnet.fo

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz

**Føroyingafelagið í Stavanger**
www.foroyingafelag.com

**Føroyingafelagið í Århus**
Vestergade 48 D, 8000 Århus C
www.aarstova.dk

**Blákrossbúðin, Kongagøta 10, Tórshavn**
Tekur ímóti góðum klæðum, Opið er: mánadag – fríggjadag frá kl 10-12 og 14-17.30 og leygardag frá kl 11-14
Blái Krossur hjálpir fólki í Føroyum við rústrupuleikum.

**Blákrossbúðin, Heiðavegur 32, Tórshavn**
Tekur ímóti góðum klæðum. Opið er: mánadag – fríggjadag frá kl kl 13-17:30 og leygardag frá kl 10-13.
Blái Krossur hjálpir fólki í Føroyum við rústrupuleikum

**ACA-fundur**
**Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11-12 á Tinghúsvegi 37.

**AA Into action fundur**
http://foroyar.aaintoaction.se
Tvøroyri, tórsdag kl. 19-20 í Gomlu læknahúsinum. Allir fundirnir eru opnir. www.aaintoaction.se

**AA-fundir í Havn**
Tinghúsvegur 37
Mánadag: kl. 20-21
Hósdag: kl. 20-21
Fríggjadag: kl. 20-21 og kl. 22.30-23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17-18.
Leygardag: kl. 22.30-23.30 AA-fundur.
Sunnudag: kl. 11-12.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundir**
(Big book meeting)
Týsdag: kl. 20. Stóri bókafundur er hvørt týskvøld í Losjuni á Tinghúsvegi 18. Inngongd frá Bøkjarabrekku.

**AA-fundir í Vestmanna**
adressan er flutt í tey gomlu sýslumannahúsini. Hósdag kl. 20 AA-fundur. Sunnudag kl. 17 AA-fundur (opin fundur).

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anonfundur**
er týskvøld kl. 21 í Torvalds kaffi á kajini í Norðagøtu.

**Al-Anon**
fundur fyri avvarðandi at alkaholikkara er hvørt týskvøld kl. 21, á Mýruvegi 22.

**Al-Anon**
fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum eru í skúlanum í Porkeri hvørt mánakvøld millum kl. 21-22.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19 og sunnudag kl. 16 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA fundir á Tvøroyri**
(í gomlu læknamiðstøðini) Sunnudag kl. 15. AA fundur (opin fundur seinasta sunnudag í hvørjum mánaða)

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld
kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
Rúslinjan hjá Bláa Krossi, tlf. 318586, svarar fríggja-, leygar- og sunnukvøld kl. 20 - 24. Hevur tú trupulleikar av rúsdrekka ella øðrum rúsandi? Stendur tú einum mær, ið hevur trupulleikar av rúsdrekka ella øðrum rúsandi? Rúslinjan er anonym telefonráðgeving í svarar alt samdøgrið.

# Tøkk



Túsund takk til øll tykkum, sum vóru við til at gera hjúnarbandsdag okkara tann 10.10.10 so fantastiskan og ógloymandi fyri okkum. Takk fyri heilsanir, gávur og hjálpsemi. Serliga ynskja vit at takka tykkum, sum gjørdu løtuna í kirkjuni so sera vakra og veitsluna aftaná so væleydnaða og hugnaliga.